# Brotnar nasar og brendar tenn

**MáF skipar fyri smikuskeiði, har fólk á professionellan hátt læra at brúka make-up til øll sløg av sjónleiki, films- og sjónvarpsarbeiði.**

LEIKLIST
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sminkuskeiðið, sum Meginfelag áhugaleikara Føroya (MáF) saman við Havnar Sjónleikarafelag skipar fyri í døgunum 13. og 14. januar, setur stór krøv til uppfinningarsemi.
– Undirvíst verður í »special effects«, at gera ung fólk gomul og umvent, leggja skuggar, gera blóðspreingingar og svartar tenn. Vit fara at læra at gera eftirgjørdar nasar, skegg og eygnabrýr, skotsár, brunasár, brotnar nasar og snáldrað andlit, boðar MáF frá í tíðindaskrivi í dag.

Og sagt verður víðari, at á skeiðinum læra fólk á professionellan hátt at kreera og brúka make-up til øll sløg av sjónleiki, films- og sjónvarpsarbeiði, og at laga tað til ymiskar fólkastøddir, aldursbólkar og etniskar útsjóndir.

Skeiðið er fyri øll áhugað, men best var, høvdu skeiðsluttakararnir frammanundan eitt sindur av kunnleika til teatursminku, sigur MáF, sum eisini upplýsir, at:

Skeiðið verður í Sjónleikarhúsinum í Havn frá leygardegnum kl. 10.00 til sunnudagin kl. 17.00, íalt 15 tímar. Vit fáa døgurða, kaffi, frukt og annað gott báðar dagarnar.

Undirvísarar eru Ann Bech Andersen og Liselotte Lunding. Tær koma frá forlagnum DRAMA í Gråsten í Danmark. Báðar hava tær undirvíst her áður á byrjunarskeiði. Prísur fyri skeiðið er 300 kr. íroknað undirvísing, tilfar og mat. Tekning fer fram hjá MáF, á telefon 315624, ella á maf@maf.fo í seinasta lagi 13. desembur 2006. Meira fæst at vita frá www.maf.fo.





## GBOB finalan aftur ein maraton uppliving

**Hóast royndirnar í fjør við eini alt ov langari altjóða GBOB finalu, hava fyrireikararnir slept ætlanini um at býta í trý umfør.**

GBOB
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Áður er boðað frá, at fyrireikararnir av altjóða GBOB finaluni høvdu lært av finaluni í fjør, og finalan tí varð hildin yvir trý kvøld. Hetta verður tó ikki so, finalan verður hildin týsdagin 12. desember.

Ætlanin var, at tvær innleiðandi hálvfinalur skuldu vera hildnar í London Astoria og at triðja kvøldið skuldu teir bestu bólkarnir bresta saman. Men sambært gbob.com, verður hetta alíkavæl ikki so. 25 bólkar úr 25 ymiskum londum skulu spæla 8 minuttir hvør framman fyri eini dómsnevnd og áskoðarum. Hetta er ein fleiri enn í fjør, og hetta er stutt sagt ov nógv av tí góða, so nú er bert at vóna, at føroyski finalisturin Deja Vu sleppur at spæla tíðliga.

Í fjør skrivaði ummælarin hjá Planet.fo soleiðis um finaluna: "Sum fráleið gjørdist konsertin næstan ikki til at halda út. At hoyra 24 bólkar spæla í samfullar 5 tímar, setir stór krøv til oyrini á áhoyrarunum, og ikki minst hjá dómarunum. Tann harði rokkurin var væl umboðaður, og tá íslendsku Fanngean komu á pallin, sum bólkur nummar 23 og spældu enn eina harða tungmálmskonsert, hevði bólkurin ikki ein livandi tjans fyri at gera seg galdandi. Oyrini vóru mett, og tað gjørdist bara larmur."

Teir 14 bólkarnir, ið longu hava tryggjað sær pláss í finaluni eru: Deja Vu (Føroyar), De Jah Groove (Avstralia), The Broken Hearted (Kanada), Cody (Danmark), Bizali (Ongland), Amplify (Týskland), Flare Odds (Japan), Silver (Niðurlond), Senit (Noregi), Estrella (Skotland), House of Ghosts (Serbia), The Moving Pictures (Svøríki), Etwas Unders (Ukraina), Ninja Pigeon (Wales)


## Hjálpargrunnurin

### fyri óarbeiðsførar fiskimenn

Umsóknarbløð til grunnin fáast við at skriva til: Postboks 2114, FO-165 Argir, ella at ringja á tlf. 316089 (svarar eftir arbeiðstíð) ella leggja boð á telefonsvararan.

***Umsóknir til hjálpargrunnin mugu vera grunninum í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. desember 2006.***

**Hjálpargrunnurin**






Sóknast verður eftir stuðulsfólkum til Eysturoyar og Streymoyar øki

**Stuðulsfólkaskipanin fyri børn er skipan á Almannastovuni, sum veitir stuðul til heimabúgvandi, ið bera brek. Stuðulsfólkaskipanin fevnir um alt landið. Í skipanini starvast í løtuni uml. 80 fólk. Á Almannastovuni virka vit miðvíst fyri at lúka krøvini frá politiska myndugleikanum og viðskiftafólkunum. Dentur verður lagdur á høgt tænastustøði, rættartrygdina og virðingina fyri einstaklinginum, eins og virkað verður fyri áhaldandi at menna førleikan, trivnaðin og samstarvið á stovninum.**

Arbeiðstíðin kann vera skiftandi, og tey ið sett verða mugu tola broytingar í starvinum. Talan kann eisini vera um samansettar uppgávur. Talan er um fleiri stuðulsuppgávur, við ymiskum tímatali. Tímatalið verður tí eftir avtalu.

Søkt verður eftir fólkum við viðkomandi heilsu- og námsfrøðiligum útbúgvingum, sum til dømis ergo- og fysioterapeutum, námsfrøðingum, heilsustøðingum og sjúkrarøktarfrøðingum. Eisini verður søkt eftir dugnaligum hjálparfólkum.

Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum fíggjamálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknarfreistin er 28. november 2006.
Skrivlig umókn, prógv og viðmæli skulu sendast til:

Stuðulsfólkaskipanina fyri børn,
Almannastovan, Tinghúsvegur 14,
Postboks 3096, 110 Tórshavn.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til Joan Olsen, ella Ragnhild Dahl, stuðulsráðgevar, tel 35 35 70.

stuðulsfólkaskipanin fyri børn
www.almannastovan.fo